**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 9. november 2015, kl. 19$^{00}$.**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og John Zachariassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 150**
Tilmæli frá fíggjarnevndini í sambandi við 2. viðgerð av uppskotið til fíggjarætlan fyri Heimatænastuna fyri VEKS fyri 2016.
J.nr. 00.17.20-S02-1-15

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 3. november 2015 uppskotið til fíggjarætlan fyri Heimatænastuna fyri VEKS fyri 2016.

Málið varð tikið av skránni, tí allar upplýsingar vóru ikki fingnar til vega frá VEKS. Málið verður tikið uppaftur á bygdarráðsfundinum 9. november 2015.

**Viðv. 150**
Bygdarráðið samtykti at heita á umsitingina um at greina málið nærri til komandi bygdarráðsfund.

**Mál 151**
Tilmæli frá fíggjarnevndini í sambandi við 2. viðgerð av uppskoti til endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015.
J.nr. 00.30.10-S02-1-14

Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 3. november 2015 at leggja uppskotið til endurskoðaðu fíggjarætlanina fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð.

**Viðv. 151**
Eitt einmælt bygdarráð samtykti at taka undir við uppskotinum til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015.

**Mál 152**
2. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016.
J.nr. 00.30.10-S02-1-15

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 3. november 2015 uppskotið til fíggjarætlanin fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið til fíggjarætlanina fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð. Í uppskotinum er roknað við, at barnafrádrátturin verður hækkaður upp í kr. 5.000 og at kommunuskattaprocentið verður lækka til 21%.

**Viðv. 152**
Karl A. Olsen mælti til, at barnafrádrátturin í 2016 verður hækkaður úr kr. 4.000 upp í kr. 5.000. Uppskotið varð einmælt samtykt.
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, mælti til at lækka kommunuskattaprocentið úr 22% niður í 21,5%. Uppskotið varð einmælt samtykt.
At enda varð atkvøtt um at samtykkja uppskotið til fíggjarætlanina fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016. Uppskotið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 22.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson Herit Magnussen

Durita á Heygum Malan Stórá